# Räikkönen vann í Istanbul

**Tað varð týðiliga undirstrikað, at tað eru McLaren og Renault, sum eiga bestu bilarnar í ár. Eingin annars var nakran tíð nær nám-ind fýra teimum fremstu plássunum**

FORMEL 1
*Niels Uni Dam*



*Kimi Räikkönen var fyrstu løtuna yvirhálaður av Fisichella, men hann megnaði skjótt at taka hetta aftur, og so helt sterki finnlendingurin fast um HM-møguleikan*

*Mynd: Reuters*

McLaren-Mercedes og Renault vístu, at hetta eru bestu bilarnir í ár. Teirra fýra bilar lógu fremstir alla koyringina á nýggju formel 1 breytini í Istanbul. Giancarlo Fisichella byrjaði bestur og slapp framvið Kimi Räikkönen í byrjanini. Renault bilurin hjá Fisichella hevði nógv minnið bensin í tanganum enn McLaren bilurin hjá Räikkönen og var tí kvikari avstað. Men nøkur fá sving seinni yvirhálaði Räikkönen og tók fyrsta plássið aftur. Hetta varð avgerandi yvirhálingin, tí Räikkönen slepti ikki fremsta plássinum aftur.

Eitt sindur verri gekk hjá Fisichella. Hann megnaði ikki, at halda liðfelagan Alonso aftan fyri seg. Hann endaði á fjórða plássi, tá Juan Pablo Montoya, sum byrjaði í fjórðu støðu, fór framvið báðar Renault bilarnar í fyrsta pittstoppi.

Montoya lá á øðrum plássi inntil seinasta umfar, tá Alonso slapp framvið honum. Ein samanstoytur við Tiago Monteiro átti stóran part av skuldini. Á triðjseinasta umfarið Montoya bremsaði heldur bráðliga og portugisiski Monteiru rendi sín Jordan Toyota upp í reyvina á McLaren-Mercedes bilinum hjá honum. Hetta hóast Montoya lá fleiri umfør frammanfyri hann, við hesum fekk Alonso minkað somikið um munin upp til Montoya, at tá Montoya fór av breytini á seinasta umfarið, misti hann annað pláss.

Koyringin gjørdist annars sera spennandi við nógvum yvihálingum og sannførandi koyring av serliga Jenson Button, sum seinastu nógvu umførini trýsti Fisichella, men tó ikki megnaði at taka fjórða pláss. Jenson Button hevði ivaleyst verið á sigursskammilinum, um hann ikki var byrjaður á trettandu byrjunarstøðu. Hann lá annars væl fyri í tíðarkoyringini áðrenn hann koyrdi tvær ferð útav.

Jarno Trulli byrjaði av fimtu støðu og megnaði at halda fimtu pláss heilt til Jenson Button fór framvið honum í sambandi við seinasta pittstop.

Christian Klien og David Coulthard í Red Bull Racing bilunum fingu tey seinastu stigini á sjeynda og áttanda plássi. Klien koyrdi sannførandi, og hetta telur væl í stríðnum at vinna sær eitt setur í Red Bull Racing næsta kappingarár. Liðið hevur longu kunngjørt, at antin Klien ella Vitantonio Liuzzi koyra fyri liðið næsta ár, saman við David Coulthard.

Samanumtikið var koyringin frálík, breytin hevði brekkur, og blind sving, og spennandi møguleikar fyri at yvirhála. Breytin er eitt meistaraverk, og Turkaland hevur fingið eina breyt, sum uttan iva verður karmur um nógvar spennandi koyringar í framtíðini.

# Ræðandi dagur hjá Williams og Michelin

Fyri Williams BMW gjørdist sunnudagurin heldur stuttur, báðir bilarnir hjá Williams punkteraðu tvær ferðir hvør á høgra bakdekki.

Longu fimta umfar punkteraði Heidfeld, sum tá lá á sætta plássi, tvey umfør seinni var tað høgra bakdekk hjá Webber, sum brast, hetta hendi beint aftan á at Webber var komin framvið pitinnkoyringini. Hann var tá á sætta plássi. Tað tók langa tíð at koyra punkteraða bilin eitt heilt umfar og aftur í pit. Tá Webber kom aftur á breytina var hann aftastur.

Á 23. umfari punkteraði sama dekk hjá Webber og hann koyrdi beint í garagguna og gavst. Við trimum høgra bakdekkum punkteraðum á eini breyt við háferð svingum, var hetta einasta rætta loysn. At Heidfeld ikki var tikin úr koyringini beinanvegin var undrunarvert. Heidfeld megnaði at koyra seks umfør afturat, áðrenn hansara høgra bakdekk aftur punkteraði.

Við ferð upp um 300 kmt. var tað heppið, at eingin skaði stóðst av øllum hesum punkteringunum. Fyri Michelin, sum noyddist at takað allar sínar bilar út úr koyringini í USA, orsakað av eini líknandi hending, er hetta ikki bara pínligt, men beinleiðis ræðandi.

**-nud**

## Úrslitið á Otodrom breytini í Istanbul

| Nr. | Koyrari | Bilslag | stig |
|---|---|---|---|
| 1 | Kimi Räikkönen | McLaren-Mercedes | 10 |
| 3 | Fernando Alonso | Renault | 8 |
| 2 | Juan Pablo Montoya | McLaren-Mercedes | 6 |
| 4 | Giancarlo Fisichella | Renault | 5 |
| 5 | Jenson Button | BAR- Honda | 4 |
| 6 | Jarno Trulli | Toyota | 3 |
| 7 | Christian Klien | Red Bull Racing | 2 |
| 8 | David Coulthard | Red Bull Racing | 1 |
| 9 | Takuma Sato | British American Racing Honda | |
| 10 | Rubens Barrichello | Ferrari | |
| 11 | Jacques Villeneuve | Sauber-Petronas | |
| 12 | Ralf Schumacher | Toyota | |
| 13 | Robert Doornbos | Minardi-Cosworth | |
| 14 | Narain Karthikeyan | Jordan-Toyota | |
| 15 | Tiago Monteiro | Jordan-Toyota | |
| Úti | | | |
| 16 | Christijan Albers | Minardi-Cosworth | |
| 17 | Michael Schumacher | Ferrari | |
| 18 | Nick Heidfeld | Williams-BMW | |
| 19 | Felipe Massa | Sauber-Petronas | |
| 20 | Mark Webber | Williams-BMW | |

**HM fyri koyararar**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Fernando Alonso | 95 |
| 2 | Kimi Räikkönen | 71 |
| 3 | Michael Schumacher | 55 |
| 4 | Juan-Pablo Montoya | 40 |
| 5 | Jarno Trulli | 39 |
| 6 | Giancarlo Fisichella | 35 |
| 7 | Ralf Schumacher | 32 |
| 8 | Rubens Barrichello | 31 |
| 9 | Nick Heidfeld | 28 |
| 10 | Mark Webber | 24 |

**HM fyri lið**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Renault F1 | 130 |
| 2 | McLaren-Mercedes | 121 |
| 3 | Scuderia Ferrari | 86 |
| 4 | Toyota Racing | 71 |
| 5 | BMW WilliamsF1 | 52 |
| 6 | Red Bull Cosworth | 27 |
| 7 | BAR Honda | 24 |
| 8 | Sauber Petronas | 14 |
| 9 | Jordan Toyota | 11 |
| 10 | Minardi Cosworth | 7 |

## Alonso nærkast heimsmeistara heitinum

Áðrenn koyringina á Otodrom breytini í Istanbul lá Fernando Alonso á odda í kappingini um heimsmeistaraheitið 26 stig framman fyri Kimi Räikkönen. Í Budapest vann Räikkönen, meðan Alonso einki stig fekk, hetta gjørdi, at eitt sindur av spenningi kom aftur í kappingina.

Hesin spenningur hvarv aftur í Istanbul. Gaman í Räikkönen vann, men við Alonso á øðrum plássi styttist munurin millum kappingarneytarnar einans við tveimum stigum. Við fimm koyringum eftir eru 24 stig sera stórur munur, og Alonso líkist alsamt meira einum heimsmeistara.

**-nud**

## Schumacher gavst tvær ferðir

Sjeyfaldi heimsmeistarin Michael Schumacher hevði eitt ringt vikuskifti. Í tíðarkoyringini koyrdi hann útav, og tá liðið noyddist at umvæla bilin byrjaði Schumacher næstseinastur. Í sjálvari byrjanini fór hann av nítjanda upp á ellivta pláss, men rakti samstundis eitt petti av bilinum hjá Felipe Massa, sum rendi útav og breyt gronina á bilinum. Á fjúrtanda umfari lá Michael Schumacher á tíggjunda plássi, og megnaði ikki at sleppa framvið Ferrari liðfelagan-um Rubens Barrichello. Hann fór tí í pit og kom út beint framman fyri Webber. Tá Webber royndi at sleppa framvið honum, rendu teir saman, og báðir fingu stórar umvælingar í pittinum. Eitt umfar seinni gavst Schumacher, men kom aftur á breytina tá 42 umfør vóru koyrd. Hann koyrdi 9 umfør, soleiðis at hann hevði koyrt longur enn Webber, Massa og Heidfeld. Hetta ger, at hann ikki skal byrja fyrstur í tíðarkoyringini á Monza næstu ferð.

**-nud**